# – Vit eru við fyri at vísa andlit

**Soleiðis sigur Ragnar Isaksen, sum á fyrsta sinni fer til Oyggjaleikir í golf. Saman við tveimum øðrum føroyingum skal hann seta Føroyar á Oyggjaleikakortið**

GOLF
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Hóast Ragnar Isaksen bert hevur spælt golf í tvey ár, er tíðin longu komin til at royna seg á Oyggjaleikunum. Ungi kvívíkingurin heldur at teir føroysku spælararnir eru við fyri at gera føroyar merktar, men vísur tó á, at ein leikari okkara hevur sera góðar møguleikar at gera seg galdandi frammi í oddinum.

## Sterkt lið

Hóast føroyska liðið bert telur tríggjar mans, so má liðið sigast at vera sterkt. Umframt Ragnar Isaksen, fara Rói Christiansen og Jónfinn Thomassen at umboða føroyska liðið. Rói og Jónfinn eru búgvandi í Danmark, og eru teir báðir tvey sterk kort at hava í hondini hjá føroyingunum.

Rói Christiansen er hægst styrkismettur í felagnum, sum hann spælir við í Danmark. Ragnar hevur góðar vónir fyri at Rói fer at standa seg væl.

– Rói er ein góður spælari, og eg vildi mett hann fer at røkk teimum fremstu 10. Eg vænti tó at hann ætlar sær enn longur upp, heldur Ragnar fyri.

## Vánaligar umstøður

Tað skal ikki vera nøkur loyna, at fleiri føroysk ítróttarfólk stríðast í sera vánaligum umstøðum. Her millum telist eisini golf, sum verður spælt hjá bóndanum á Glyvursnesi. Tað er einasti føroyski golfklubburin, Tórshavnar Golfklubbi, ið hevur útvegað sær hetta spælistaðið.

– Tú sært hvussu lendi er her. Her er mold og grót, sum ikki finst á nøkrum øðrum golfvallum í heiminum, sigur Ragnar, meðan hann peikar okkum á støðini við golfstavi sínum.

Arbeitt verður tó við eini ætlan um ein nýggjan golfvøll, ið fer at lúka allar altjóða treytir. Sum skilst, er ætlanin komin langt.



*– Tað fer at vera ein fantastisk uppliving. Eg hevði strembað eftir at sleppa á Oyggjaleikir á Álandi um tvey ár, so hetta er ein framskundaður dreymur, sigur Ragnar Isaksen*

## Veðrið darvar

Viljin drívur verkið. Soleiðis verður ofta tikið til, og hetta kann eisini sigast um føroyskar golfspælarar. Føroyska veðurlagið er als ikki nummar eitt til at spæla golf í, men hetta leggja spælarar líka í.

– Kappingar her heima verða spældar í øllum veðri. Mjørkin skal koma heilt inn til nøsina á tær, áðrenn vit fara at avlýsa nakra kapping, sigur ein avgjørdur Ragnar, sum henda kalda dagin sjálvur stendur í einari t-skjúrtu og slær kúlurnar avstað.

Sum vera man er hann er Ragnar sera glaður fyri gylta møguleikan, ið hann hevur fingið.

– Tað fer at vera ein fantastisk uppliving. Eg hevði strembað eftir at sleppa á Oyggjaleikir á Álandi um tvey ár, so hetta er ein framskundaður dreymur, sigur Ragnar Isaksen.

